# Okkum tørvar goymslufólk beinanvegin!

Arbeiðið umfatar alt vanligt goymsluarbeiði og vøruavgreiðslu. Harumframt kanst tú vænta at arbeiða ein part av tíðini í nýggja handli okkara, "VEITARIN".

Vit bjóða tær eitt spennandi og avbjóðandi starv í eini fyritøku í rúkandi menning, her heima so væl sum í útlondum.

Vit vænta, at tú ert fryntlig/ur, fyrikomandi, arbeiðssom/samur, dugir at hugsa sjálvsstøðugt, samstundis, sum tú eisini dugir væl at samstarva. Teldukunnleiki er ein fyritreyt, trukksertifikat er ein fyrimunur.

Send umsókn við prógvum og møguligum viðmælum sum skjótast, ella ring/send teldupost beinleiðis til Debes Petersen á tlf. 350830 ella tlf. 217708, teldupost: debes@kemilux.com .

*Føroyska fyritøkan KEMILUX SIRIUS bjóðar eina fullfíggjaða skrá av reingerð-arevnum til fiski- og matvøruídnað umframt stovnar og vanlig húsarhald. Umleið 1/3 av framleiðslu okkara verður seld uttan fyri Føroyar. Eisini veita vit pakkitilfar og -amboð, maskinur og arbeiðsklæðir v.m. til vinnu og ídnað.*

*Vit framleiða eftir altjóða ISO:9001 góðsku-skipanini og eru skrásettir hjá Achilles sum góðkendur veitari til m.a. oljuvinnuna. Allar vørur okkara - til heimamarknaðin so væl sum til útflutning - verða framleiddar samsvarandi lógum og reglugerðum hjá ES og teimum londum, sum útflutt verður til.*

**KEMILUX SIRIUS**
Mykinesgøta 1, FO 100 Tórshavn, tlf. 350830

## Ferðaætlan á Hvítusunnu

Í samband við, at Smyril siglir Hvítusunnucruise runt Føroyar, bjóðar Strandfaraskip Landsins øllum Føroyingum møguleikan at sigla soleiðis Hvítusunnudag 31. mai

| Leið 7 | kl |
|---|---|
| av Tvøroyri | 09:00 |
| úr Tórshavn | 12:00 * |
| úr Tórshavn | 17:00 |

** Smyril siglir runt Føroyar, Hvítusunnucruise*

| Leið 66 | kl |
|---|---|
| av Sandi | 08:30 |
| úr Skúvoy | 09:05 |
| av Sandi | 19:00 |
| úr Skúvoy | 19:35 |

| Leið 60 | kl |
|---|---|
| úr Skopun | 10:30 |
| av Gomlurætt | 11:00 |
| úr Skopun | 17:15 |
| av Gomlurætt | 17:45 |

*Allir túrar hava tilkalling í Hest*

| Leið 90 | kl |
|---|---|
| úr Tórshavn | 09:30 |
| úr Nólsoy | 09:50 |
| úr Tórshavn | 17:30 |
| úr Nólsoy | 17:50 |

| Leið 56 | kl |
|---|---|
| úr Klaksvík | 10:00 |
| úr Syðradali | 10:20 |
| úr Klaksvík | 18:30 |
| úr Syðradali | 18:50 |

| Leið 58 | kl |
|---|---|
| úr Hvannasundi | 08:45 |
| Svínoy - Fugloy | |
| úr Hvannasundi | 18:30 |
| Svínoy - Fugloy | |

| Leið 36 | kl |
|---|---|
| úr Sørvági | 09:00 |
| úr Mykinesi | 09:45 |
| úr Sørvági | 18:30 |
| úr Mykinesi | 19:15 |

*Tilkalling kvøldið fyri tel. 505218*

STRANDFARASKIP LANDSINS

almannastovan

# Stuðul til uppihaldspening

Umsókn um stuðul til uppihaldspening fyri fyrra hálvár 2009 saman við kvittanum fyri goldin barnagjøld ella hjúnafelagagjøld, skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 03.06.2009. Kvittanir skulu eisini vísa, til hvønn barna- ella hjúnafelagagjøld eru goldin. Um goldið er til TAKS, er ikki neyðugt at lata inn kvittanir.

Umsóknir, sum eru Almannastovuni í hendi innan nevndu freist, verða avgreiddar í juni 2009. Sambært lóg um stuðul til uppihaldspening verður stuðulin útgoldin seinast í juni og desembur og verða umsóknir, sum verða móttiknar aftaná 03.06.2009 ikki avgreiddar fyrr enn í desembur 2009.

Verður søkt fyrstu ferð, skal avrit av gjaldsavgerð um barna- ella hjúnafelagagjald frá Ríkisumboðnum ella samsvarandi útlendskum myndugleika sendast inn saman við umsóknini.

Umsóknarbløð kunnu heintast á heimasíðuni www.almannastovan.fo undir teiginum oyðubløð og fáast við at venda sær til økisdeildirnar.

**Økisdeildin í Tórshavn**
Tinghúsvegur 14
100 Tórshavn
tlf. 35 35 70 – fax 35 35 71

**Økisdeildin í Norðoyggjum**
Klaksvíksvegur 78A
700 Klaksvík
tlf. 45 72 40 – fax 45 72 41

**Økisdeildin í Eysturoy**
Heiðavegur
620 Runavík
tlf. 47 47 10 – fax 47 47 11

**Økisdeildin í Suðuroy**
800 Tvøroyri
tlf. 35 35 60 – fax 35 35 61

